# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 72/2024: Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum**

Løgmaður, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram 7. mars 2025, og eftir 1. viðgerð 13. mars 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20., 27. og 31. mars og 2., 11. og 28. apríl 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við áhugabólk í sambandi við uppskot til alternativa linjuføring, Hvalbiar kommunu og Tvøroyrar kommunu, Skálavíkar kommunu, Húsavíkar kommunu, Sands kommunu, Skúvoyar kommunu, Spenn Sp/f, Landsbankan, Ráðgevarafelagið, Búskaparráðið, landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Jóhan Christiansen, saman við Landsverki, landsstýriskvinnuna í uttanríkis- og vinnumálum, Sirið Stenberg, saman við Jarðfeingi, landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Margit Stórá, saman við Umhvørvisstovuni, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, og løgmann, Aksel V. Johannesen, saman við P/F Suðuroyartunnil og ráðgevum teirra frá Norconsult.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Dennis Holm, Hanna Jensen, Beinir Johannesen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at samtykkja at farast skal víðari við ætlanini at byggja Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Við uppskotinum verður tó ikki endaliga samtykt at fremja verkætlanina. Hetta verður avgjørt seinni við eini serstakari løgtingslóg, eftir at verkætlanin er liðugt fyrireikað, prosjekterað, boðin út, og at tilboðini eru innkomin, og neyvari greiða er fingin á, hvør kostnaðurin gerst av tunlinum.

Endamálið við hesum uppskotinum er at skipa virksemið hjá P/F Suðuroyartunlinum við lóg og at geva heimild til, at arbeiðið við undirsjóvartunlinum millum Suðuroy og Sandoy við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum kann halda fram.

Endamálið er at fáa til vegar eina neyvari kostnaðarmeting av verkætlanini við at geva P/F Suðuroyartunlinum heimild til at prosjektera og bjóða út verkætlanina um undirsjóvartunnilin millum Suðuroy og Sandoy, tunnilin millum Sandvík og Hvalba og vegagerð í Sandvík og Hvalba og farleið á Sandi.

Harumframt er endamálið at staðfesta, at tað er P/F Suðuroyartunnil, sum er byggiharri og at leikluturin hjá Landsverki í mun til verkætlanina er at vera góðkenningar- og eftirlitsmyndugleiki.

<u>Suðuroyartunnilin eitt týðandi stig fyri at venda gongdini í Suðuroynni</u>
Føroyska infrakervið er seinastu áratíggjuni miðvíst útbygt, soleiðis at umleið 91% av Føroya fólki í dag eru knýtt saman í eitt og sama veganet. Útbyggingin av infrakervinum við undirsjóvartunlum, fyrst Vágatunlinum í 2002, Norðoyatunlinum í 2006, og síðani Eysturoyartunlinum í 2020 og Sandoyartunlinum í 2023, hava ført við sær, at alt meginøkið er knýtt saman í ein arbeiðsmarknað við javnbjóðis møguleikum fyri vøkstri í øllum økinum.

Hetta sæst eisini aftur í gongdini í fólkatalinum. Fólkatalið í Føroyum er seinastu 10 árini vaksið við næstan 6.200 fólkum, ein vøkstur á 12,5%. Vøksturin hevur verið sjónligur í øllum meginøkinum, ikki minst eftir at undirsjóvartunlarnir eru latnir upp fyri ferðslu.

Einasta stóra økið í landinum, sum ikki hevur havt vøkstur í fólkatalinum er Suðuroyggin. Meðan fólkatalið í Føroyum seinastu 10 árini er vaksið við 12,5%, so er fólkatalið í Suðuroynni minkað við 2%.

Gongdin í Suðuroynni er eisini merkt av einari skeivari aldurs- og kynssamanseting. Miðalinntøkurnar eru lægri enn aðrastaðni í landinum. Arbeiðsloysið er hægri, og nógv arbeiði í oynni, serliga innan fiski- og alivinnuna, er óstøðugt og árstíðarbundið.

Gongdin í Suðuroynni hevur verið skeiva vegin í langa tíð og góða gongdin í samfelagnum sum heild hevur ikki ávirkað gongdina í Suðuroynni. Breið politisk semja er millum flokkarnar í Løgtinginum um, at tíðin nú er búgvin til at taka eitt týðandi stig at fremja Suðuroyartunnilin fyri at venda gongdini í Suðuroynni.

<u>Uppskotið setur gongd á næsta stig</u>
Løgmaður hevur síðani tíðliga í 2023 umvegis P/F Suðuroyartunnilin staðið á odda fyri fyrireikandi arbeiðinum, sum eisini hevur verið viðgjørt í politiska fylgibólkinum, har allir flokkar á Løgtingi hava verið umboðaðir.

Flokkarnir á Løgtingi hava eisini 8. november 2024 undirskrivað semjuskjal um Suðuroyartunnilin.

Politisk semja er eisini um at halda fram við verkætlanini Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum, har næsta stigið er at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanirnar.

Við hesum lógaruppskoti verður tó ikki farið undir Suðuroyartunnilin, tí verkætlanin verður ikki endaliga sett í gongd, fyrr enn hon er fyrireikað, prosjekterað, hevur verið í útboði og Løgtingið aftur hevur viðgjørt og tikið støðu til endaligu verkætlanina.

Viðgerðin í nevndini
Eftir 1. viðgerð í Løgtinginum 13. mars 2025 hevur Fíggjarnevndin á fundum viðgjørt lógaruppskotið og havt avvarðandi partar inni til hoyringar. Meirilutin í Fíggjarnevndini tekur samanumtikið undir við uppskotinum, tó við tillagingum, sum verða nevndar niðanfyri.

Linjuføringin
Lógaruppskotið fevnir um undirsjóvartunnil frá Sandvík í Suðuroynni til Djúpadal í Sandoynni.

Meirilutin tekur undir við uppskotinum um stytstu leið, sum eisini førir við sær bíligastu tunnilsloysn. Hetta er eisini tann loysnin, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur arbeitt við í fyrireikingunum av verkætlanini.

Undir hoyringunum er komið fram uppskot um alternativa linjuføring, sum førir við sær, at undirsjóvartunnilin verður umleið 3 km longri. Alternativa linjuføringin er umrødd í nevndini og eisini saman við P/F Suðuroyartunlinum og ráðgevunum hjá P/F Suðuroyartunlinum. Undir viðgerðini hevur verið víst á, at Suðuroyartunnilin við linjuføringini millum Sandvík og Djúpadal frammanundan er ein sera langur undirsjóvartunnil. Norsku ráðgevarnir hjá P/F Suðuroyartunlinum hava fyri nevndini greitt frá, at tað í Norra altíð er málið at fáa undirsjóvartunlar so stuttar sum gjørligt, bæði orsakað av trygd og váðum, og orsakað av kostnaðinum.

P/F Suðuroyartunnilin hevur undir hoyringini mælt til at halda fast í stytstu leið ímillum Sandvík og Djúpadal, sum er umleið 22,8 km til longdar. Hesum tekur meirilutin undir við.

Skúvoy
Meirilutin tekur undir við, at prosjekteringin av Suðuroyartunlinum eisini skal fevna um prosjektering av góðari og tryggari loysn fyri Skúvoynna. Ferðslan til Skúvoynna verður tó avmarkað og stýrd, soleiðis at atlit verður tikið til bygdina.

Undir hoyringunum hevur verið víst á, at tað kann vera darvandi og dýrkandi fyri verkætlanina, um atkomutunnilin til Skúvoyar verður ein sokallaður T5,5 tunnil (sum er eitt-sporaður), tí amboðini ikki eru tey somu, sum til sjálvan Suðuroyartunnilin, sum er ein størri tunnil. Meirilutin heldur, at atkomutunnilin til Skúvoyar tí ikki í uppskotinum eigur at verða avmarkaður til ein T5,5 tunnil.

Undir hoyringunum er komið fram, at byggitíðin av allari verkætlanini við Suðuroyartunlinum kann styttast 1½-2 ár, um tað ber til at arbeiða og bora úr Skúvoynni eisini. Hetta hevði sannlíkt spart í byggikostnaðinum og hevði harumframt spart raksturin av Suðuroyarleiðini og Skúvoyarleiðini. Eisini kann boring úr Skúvoynni minka um váðan undir bygging, tí styttri kann verða inn til arbeiðsstøðini/stuffarnar (har arbeitt verður inni í tunlinum).

P/F Suðuroyartunnilin hevur undir hoyringini greitt frá, at tað eru stórir váðar knýtir at at hava arbeiðspláss í Skúvoynni, m.a. tí tað á vetrartíð kann vera óstøðug atgongd til oynna, umframt at tað fer at gera stór inntriv í bygdina at hava eitt stórt arbeiðspláss har. Harumframt er tað eisini ivasamt, um tað orsakað av umhvørvis- og náttúruatlitum ber til at hava so stórt arbeiðspláss í Skúvoynni.

Meirilutin mælir í sambandi við prosjekteringina av atkomutunli fyri Skúvoynna til, at tað verður kannað neyvt hjá avvarðandi myndugleikum, um umhvørvis- og náttúruatlit loyva at borast kann úr Skúvoynni, soleiðis at fyritøkur, sum bjóða uppá samlaðu verkætlanina, kunnu taka støðu til, um arbeiðast skal úr Skúvoynni.

Tá Suðuroyartunnilin verður boðin út, skal atkomutunnil til Skúvoyar eisini verða boðin út saman við Suðuroyartunlinum. Tá tilboðini eru komin inn, tekur Løgtingið støðu til um atkomutunnilin til Skúvoyar skal gerast.

Tunnilsstødd
Undir viðgerðini hevur nevndin eisini umrøtt spurningin um tunnilsopið av Suðuroyartunlinum, sum er somu stødd sum Sandoyartunnilin, ein sokallaður T9,5 tunnil.

Í tilfarinum, sum nevndin hevur fingið, verður víst á, at tað eigur at verða kannað nærri, um hann skuldi verið 10,5 metrar breiður heldur enn 9,5 metrar. P/F Suðuroyartunnilin hevur undir hoyringini greitt frá, at nýggjastu váðametingarnar vísa, at tað ikki er neyðugt orsakað av trygdini. Norsku ráðgevar teirra hava greitt frá, at kostnaðurin av einum T10,5 tunli verður mettur at verða 200-300 mió. kr. dýrari enn ein T9,5 tunnil, og at hetta eisini fer at føra við sær, at nøgdirnar av gróti úr tunlinum gerast størri. Greitt hevur eisini verið frá, at tað ber til at bjóða út Suðuroyartunnilin við tveimum støddum, og meirilutin heldur, at verkætlanin eigur at verða boðin út við báðum støddum.

Jarðfrøðin
Undir viðgerðini hevur eisini verið fundur við Jarðfeingi, sum hevur greitt frá jarðfrøðiligu kanningunum. Greitt hevur verið frá, at kanningararbeiðið byrjaði fyri nøkrum árum síðani, tá við trimum linjuføringum. Men seinastu árini hevur verið fokuserað uppá linjuføringina, sum gongur til Djúpadals.

Greitt hevur verið frá, at Jarðfeingi er liðugt við næstan allar kanningar. Stovnurin manglar at gera eitt sindur av feltarbeiði og síðani at greina arbeiðið, og so skriva frágreiðingina lidna. Frágreiðingin verður sannlíkt liðug seint í summar ella tíðliga í heyst. Greitt hevur verið frá, at hóast frágreiðingin ikki er liðug, so er tað onki sum jarðfrøðiliga bendir á, at ein undirsjóvartunnil ikki kann gerast millum Suðuroynna og Sandoynna.

P/F Suðuroyartunnilin hevur greitt frá, at jarðfrøðiliga frágreiðingin er ein týðandi liður í útbjóðingartilfarinum.

Vegaføringin á Traðarhamri
Í lógaruppskotinum er lagt upp til, at samanbinding ímillum Suðuroyartunnilin og Sandoyartunnilin skal gerast við farleið á Traðarhamri við vegi, sum fer upp í umleið 200 metra hædd. Meirilutin er á einum máli um, at tað eigur at verða kannað, um tað ikki í tøttum samstarvi við kommunurnar finnist ein betri loysn enn farleiðin eftir Traðarhamri, til dømis við einum tunli gjøgnum Traðarhamar.

Trygd undir arbeiðinum
Undir nevndarviðgerðini hevur verið greitt frá avbjóðingunum, sum kunnu verða við trygdini, tá arbeitt verður í so longum tunli, sum Suðuroyartunnilin er. Hesin spurningur hevur stóran týdning fyri verkætlanina sæð frá byggitekniskum sjónarhorni og hvussu sjálvt arbeiðið verður framt. Sum

heild hevur viðgerðin víst, at spurningurin um trygd undir arbeiðinum, tó ikki verður mettur at vera ein forðing fyri at fara undir Suðuroyartunnilin, um neyðugu trygdaratlitini undir bygging eru fingin upp á pláss.

Spurningurin um atkomutunnil til Skúvoynna hevur eisini verið umrøddur í sambandi við trygd undir arbeiðinum, og Norconsult hevur greitt frá, at tað hevði bøtt um trygdina, um tað bar til at arbeiða úr Skúvoynni eisini, tí longdin inn til sokallaða stuffin, verður stytt; eins og talan vildi verið um eina eyka rýmingarleið.

<u>Trygdin tá tunnilin er latin upp</u>
Undir nevndarviðgerðini hevur leiðarin fyri trygd hjá Norconsult verið í nevndini og gjøgnumgingið loysnina við trygd og upplýsingarnar í hesum partinum byggja á tað. Eisini hava verið umrøddar loysnir við trygd í tunlum aðrastaðni í Norðurlondum og í Evropa, sum hava væl meiri ferðslu enn mett verður í Suðuroyartunlinum. Í hesum sambandi hevur verið víst á, at um Suðuroyartunnlin varð gjørdur í Norra við somu fortreytum og ferðslu, so hevði loysnin verið neyvt tann sama í Norra.

Greitt hevur verið frá, at ferðslan, tvs. tali av bilum, hevur stóran týdning fyri trygdina. Í Norra er vanligt, at umleið 15% er tung ferðsla, og tað er tann parturin, sum hevur størst ávirkan á trygdina. Í Suðuroyartunlinum verður mett at 7% er tung ferðsla.

Ein partur av váðanum í undirsjóvartunlum er hallið á brekkunum. Hagtøl í Norra vísa, at tað er í brekkunum, serliga um tær eru brattari enn 5%, at óhappini kunnu henda og støðurnar av somu orsøk gerast vandamiklar. Brekkurnar í Suðuroyartunlinum eru 5% og greitt hevur verið frá, at tað er ein fyrimunir í Suðuroyartunlinum, at longdin á brekkunum er “lutfalsliga stutt”, 2 km í hvørjum enda, meðan restin er fløt.

Trygdarleiðarin hjá Norconsult hevur greitt frá, at høvuðsparturin av tilbúgvingini í øllum tunlum fevnir um, at teir flestu bilarnir kunnu venda og koyra út úr tunlinum. Hetta er eisini galdandi fyri Suðuroyartunnilin. Kunningarskelti og kunning umvegis hátalarar er tí ein týðandi partur av tilbúgvingini í vandastøðum. Tala og fráboðan í hátalarum er, eins og kunningarskeltini, knýtt at sjálvvirkandi telduskipan. Luftskiftisskipanin í tunlinum er eisini partur av tilbúgvingini, skilt soleiðis at í einari støðu við eldi, verður roykurin fyrst blástur ein veg, meðan bilar koyra út hinvegin, og síðani verður roykurin blástur hinvegin.

Annar partur av trygdini er trygdarrúm. Greitt hevur verið frá, at trygdarrúm verða fyri hvørjar 500 metrar, og verður tað mett at vera ein góð loysn fyri Suðuroyartunnilin. Upplýst er fyri nevndini, at trygdarrúm í tunlinum gera eisini, at tað ikki er neyðugt við døgn-tilbúgving við hvønn tunnilsmunna.

Spurningurin um trygdarrúm og ES-direktiv hevur eisini verið umrøddur, og greitt hevur verið frá, at ES-direktivið setur standard fyri tunlar í øllum Evropa, og at hetta vanliga eru tunlar við sera nógvari ferðslu, væl hægri enn tunlar í Føroyum og í Norra. Leiðarin fyri trygd hjá Norconsult hevur greitt frá, at um Suðuroyartunnilin varð gjørdur í Norra, so høvdu tilmælini um loysnir í samband við trygd verið tey somu sum í verandi verkætlan fyri Suðuroyartunnilin.

Spurningurin um sprinklara-anlegg í tunlinum hevur eisini verið umrøddur. Upplýst er fyri nevndini, at hetta neyvan er rætta loysnin og at ein slík verður lítið brúk. Fyri nevndini varð greitt

frá einum dømi um sprinklara-anlegg í einum svenskum tunli, har tað var sera nógv ferðsla, og har endamálið við sprinklara-anlegginum var at halda eldinum niðri, um eldur skuldi komið í ein bil. Víst varð á, at hendan loysnin ikki er viðkomandi í Suðuroyartunlinum.

Spurningurin um tilbúgvingar-støð mitt í Suðuroyartunlinum hevur eisini verið umrøddur. Greitt hevur verið frá, at hetta er ein loysn sum er sera lítið brúkt. Í Evropa er hetta helst bara á einum stað, og tað er í Sveis í einum tunli við sera nógvari ferðslu. Arbeiðsviðurskiftini í einari tilbúgvingar-støð mitt í tunlinum eru sera krevjandi. Upplýst er fyri nevndini, at metingarnar higartil ikki tilsiga, at tilbúgvingarstøð mitt í tunlinum er neyðug.

Meirilutin leggur dent á, at trygdarspurningurin í lidna tunlinum skal verða viðgjørdur væl og virðiliga í prosjekterings-tíðarskeiðnum, soleiðis at trygdin er í hásæti.

Lokala tilbúgvingin
Sambært galdandi lóg liggur tilbúgvingin í tunlum hjá avvarðandi kommunum. Nevndin hevur av Løgmansskrivstovuni verið kunnað um, at Løgmansskrivstovan er tilvitað um, at tær smáu kommunurnar ikki kunnu hava ábyrgdina av tilbúgvingini og arbeitt verður við loysn saman við Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum.

Fíggjarligi parturin
Fíggjarligi parturin hevur verið viðgjørdur í nevndini. Viðgerðin hevur m.a. fevnt um gjøgnumgongd av uppskotinum til fíggingarleist, sum er í lógaruppskotinum. Harumframt hevur nevndin eisini umrøtt fíggjarliga partin saman við Landsbankanum og saman við Búskaparráðnum. Eisini er kost-nyttu greiningin hjá Landsverki umrødd.

Meirilutin hevur noterað sær, at Landsbankin vísti á, at tað í verandi støðu hevði verið rættast politiskt at raðfesta onnur økir enn Suðuroyartunnilin, m.a. almannaøkið og eldraøkið.

Búskaparráðið hevði eisini fyrivarni í mun til langtíðar haldførið í búskapinum. Búskaparráðið hevur eisini víst á, at ætlaðu innskotini í Suðuroyartunnilin á tilsamans 1,35 mia. kr. í samanberingini av Suðuroyartunlinum og siglandi Suðuroyarleið, eiga at verða tikin við sum ein møguligur stuðul til Strandfaraskip Landsins til keyp av nýggjum Suðuroyarskipi. Í hesum sambandi vísir meirilutin á, at tað er ein politisk raðfesting at lata stuðul til P/F Suðuroyartunnilin, eins og tað var ein politisk raðfesting at seta partapening í P/F Eystur- og Sandoyartunlar, og at lata stuðul til ferðsluveðhald og til innkomuvegir í Runavík og Tórshavn.

Meirilutin heldur, at tað er sera týdningarmikið at hava fyri eyga, at Suðuroyartunnilin er størsta einstaka verkætlan, sum Føroyar nakrantíð eru farnar í holt við. Tað er tí ein sjálvsøgd fortreyt fyri verkætlanini at politisk semja er um, hvussu haldførisavbjóðingin skal loysast, herundir at neyðugar tillagingar verða gjørdar í løguætlan, raðfestingum og rakstri.

Í skrivandi stund eru tað óvissur kring fíggjarliga partin, tí kostnaðurin av samlaðu verkætlanini ikki er kendur fyrr enn tilboðini uppá Suðuroyartunnilin eru komin inn í 2026. Avgerðin um at seta verkætlanina ígongd verður ikki tikin fyrr enn Løgtingið aftur hevur viðgjørt og tikið støðu til innkomnu tilboðini og endaligu verkætlanina.

Grót
Nevndin hevur eisini viðgjørt spurningin um hvussu stóra nøgdin av gróti, sum kemur úr Suðuroyartunlinum í Suðuroynni og í Sandoynni, kann gagnnýtast best.

P/F Suðuroyartunnilin hevur greitt frá, at kommunurnar í Suðuroynni eru sinnaðar at taka alt grótið. Í Sandoynni er eisini ávísur áhugi hjá kommunum, men talan verður helst um avmarkaðar nøgdir.

Í Sandoynni eru eisini stórar nøgdir av gróti, sum koma úr Suðuroyartunlinum og hevur tað týdning, at góðar loysnir verða funnar fyri nýtsluna av grótinum áðrenn farið verður í gongd. Greitt er, at grótið er eitt tilfeingi, sum eigur at fáast sum mest burturúr, og tað hevur týdning at gera meiri við at kanna og royna at finna náttúruvinarligar loysnir fyri ta stóru nøgdina av gróti. Ráðgevarafelagið hevur undir hoyringini víst á, at ein møguleiki er at skipa eina hugskotskapping um hvussu grótið Sandoyarmegin best kann gagnnýtast. Meirilutin tekur undir við hesum hugskoti og metir tað hava týdning at gera heldur meira við at kanna, meta um og royna at finna visjonerar og náttúruvinarligar loysnir fyri ta stóru nøgdina av gróti, sum kemur úr tunlinum.

Umhvørvis- og náttúruatlit
Meirilutin er sannførdur um, at neyðug umhvørvis- og náttúruatlit skulu takast í samband við Suðuroyartunnilin. Meirilutin ásannar tó eisini, at tað slepst ikki undan, at stórar útbyggingar av infrakervinum, sum Suðuroyartunnilin við atknýttum verkætlanum, fara at hava ávirkan á umhvørvið og náttúruna. Tað er tó av størsta týdningi, at neyðug umhvørvis- og náttúruatlit verða tikin í sambandi við verkætlanina.

Løgmansskrivstovan hevur tann 23. apríl 2025 sent nevndini eina áheitan um at gera ávísar broytingar í lógaruppskotinum. Áheitanin liggur sum nevndarskjal í málinum og snýr seg um at broyta § 8 fyri at tryggja, at frágreiðingin um avleiðingar fyri náttúru og umhvørvi er nøktandi, við at áseta, at Umhvørvisstovan skal góðkenna frágreiðingina umframt annað í hesum sambandi. Meirilutin tekur undir við hesum og hevur hetta tí við í sínum broytingaruppskoti.

Førleikamenning av føroyskum fyritøkum og føroyskari arbeiðsmegi
Meirilutin hevur viðgjørt spurningin um, hvussu føroyskar fyritøkur og føroysk arbeiðsmegi kann førleikamennast í sambandi við at Suðuroyartunnilin verður gjørdur.

Talan er um størstu verkætlan í Føroya søgu, og tá verkætlanir av hesari støðd verða gjørdar, so eigur tað at verða ein natúrligur partur, at tað tilvitað verður hugsað um at førleikamenna føroyskar fyritøkur og føroyska arbeiðsmegi.

Ráðgevarafelagið hevur undir viðgerðini greitt frá, at føroyskar fyritøkur eru førar fyri at loysa allar ráðgevingaruppgávur í samband við Suðuroyartunnilin. Tað hevur eisini stóran týdning fyri møguleikan at draga útbúnar føroyingar aftur í ráðgevarastørv í Føroyum, at føroyska ráðgevaravinnan sleppur uppí part, tá stórar spennandi verkætlanir, sum Suðuroyartunnilin, verða gjørdar.

Meirilutin mælir til, at førleikamenning av føroyskum fyritøkum og føroyskari arbeiðsmegi verður hugsað inn, tá Suðuroyartunnilin verður bjóðaður út.

<u>Meirilutin tekur undir við uppskotinum</u>
Meirilutin tekur undir við lógaruppskotinum, men har tað tó verða gjørdar tillagingar viðvíkjandi:

- atkomutunli til Skúvoyar
- kanning av møguleikunum fyri at bora úr Skúvoynni eisini
- vegaføringini á Sandi
- kanning av møguleikunum fyri einum T10,5 tunli
- gagnnýtsluni av grótinum úr Suðuroyartunlinum
- førleikamenning av føroyskum fyritøkum og føroyskari arbeiðsmegi

Meirilutin setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"P/F Suðuroyartunnilin fyrireikar, prosjekterar og letur í útboð hesar verkætlanir:
1) Farleið frá Sandoyartunlinum í Traðardali til tunnilsmunna í Djúpadali, norðanfyri Skarvanes, við íbinding í verandi veg til Skarvanesar og íbinding til verandi veg til Skálavíkar,
2) undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norður í sama bergholi frá Djúpadali til Sandvíkar,
3) atkomutunnil við stýrdari atkomu frá Suðuroyartunlinum til Skúvoyar,
4) vegagerð millum undirsjóvartunnilin í Sandvík og nýggja Sandvíkartunnilin,
5) tunnil úr Sandvík til Hvalbiar, og
6) vegagerð í Hvalba, frá Sandvíkartunlinum til landsvegin frá nýggja Hvalbiartunlinum."

**2.** Í § 5, stk. 1 verður "sum nevndir eru í § 3, stk. 1, nr. 1 og 2 og 5-7" broytt til: "sum nevndir eru í § 3, stk. 1, nr. 1 og 4-6".

**3.** Í § 6, stk. 1, verður "Suðuroyartunnilin, sbr. § 3, stk. 1, nr. 3 og 4" broytt til: "Suðuroyartunnilin, sbr. § 3, stk. 1, nr. 2 og 3".

**4.** § 8 verður orðað soleiðis:
"**§ 8.** P/F Suðuroyartunnilin hevur skyldu til at fáa til vegar eina frágreiðing um avleiðingar fyri náttúru og umhvørvi (umhvørvisárinsmeting) av samlaðu verkætlanini. Áðrenn farið verður undir verkætlanina, skulu úrslit av umhvørvisárinsmetingini vera góðkend av Umhvørvisstovuni.
*Stk. 2.* Viðkomandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir skulu hoyrast, áðrenn umhvørvisárinsmetingin verður góðkend.
*Stk. 3.* Góðkenningin sbrt. § 8, stk. 1 kann kærast til landsstýrisfólkið við umhvørvismálum av teimum, sum eru partur av málinum. Kærufreistin er fýra vikur.
*Stk. 4.* P/F Suðuroyartunnilin skal endurrinda útreiðslur, sum Umhvørvisstovan hevur í sambandi við viðgerð av umhvørvisárinsmeting og umhvørvisgóðkenning, sbrt. § 8, stk. 1 og stk. 3. Gjaldið verður roknað við støði í tímanýtslu og tímakostnaði hjá Umhvørvisstovuni.
*Stk. 5.* Undirsjóvartunnil sbrt. § 3, stk. 1, nr. 2 og 3 krevur loyvi sbrt. § 26, stk. 1 í umhvørvisverndarlógini."

**Viðmerkingar til broytingaruppskotið:**
Til nr. 1:
Í lógaruppskotinum er lagt upp til, at samanbinding ímillum Suðuroyartunnilin og Sandoyartunnilin skal gerast við farleið á Traðarhamri við vegi, sum fer upp í umleið 200 metra hædd. Meirilutin er á einum máli um, at tað eigur at verða kannað, um tað ikki í tøttum samstarvi við kommunurnar finnist ein betri loysn enn farleiðin eftir Traðarhamri, til dømis við einum tunli gjøgnum Traðarhamar.

Undir hoyringunum hevur verið víst á, at tað kann vera darvandi og dýrkandi fyri verkætlanina, um atkomutunnilin til Skúvoyar verður ein sokallaður T5,5 tunnil (sum er eitt-sporaður), tí amboðini ikki eru tey somu, sum til sjálvan Suðuroyartunnilin, sum er ein størri tunnil. Meirilutin er á einum máli um, at atkomutunnilin til Skúvoyar ikki í uppskotinum eigur at verða avmarkaður til ein T5,5 tunnil.

Undir hoyringunum er komið fram, at byggitíðin av allari verkætlanini við Suðuroyartunlinum kann styttast 1½-2 ár, um tað ber til at arbeiða og bora úr Skúvoynni eisini. Hetta hevði sannlíkt spart í byggikostnaðinum og hevði harumframt spart raksturin av Suðuroyarleiðini og Skúvoyarleiðini. Eisini kann boring úr Skúvoynni minka um váðan undir bygging, tí styttri kann verða inn til arbeiðsstøðini/stuffarnar (har arbeitt verður inni í tunlinum).

Meirilutin er á einum máli um, at í sambandi við prosjekteringina av atkomutunli fyri Skúvoynna verður kannað neyvt hjá avvarðandi myndugleikum, um umhvørvis- og náttúruatlit loyva at borast kann úr Skúvoynni, soleiðis at fyritøkur, sum bjóða uppá samlaðu verkætlanina, kunnu taka støðu til, um arbeiðast skal úr Skúvoynni.

Tá Suðuroyartunnilin verður boðin út, skal atkomutunnil til Skúvoyar eisini verða boðin út saman við Suðuroyartunlinum. Tá tilboðini eru komin inn, tekur Løgtingið støðu til um atkomutunnilin til Skúvoyar skal gerast.

Meirilutin er á einum máli um, at tað eigur at verða kannað nærri, um Suðuroyartunnilin skuldi verið 10,5 metrar breiður heldur enn 9,5 metrar. Greitt hevur eisini verið frá, at tað ber til at bjóða út Suðuroyartunnilin við tveimum støddum, og meirilutin heldur, at verkætlanin eigur at verða boðin út við báðum støddum.

Greitt er, at grótið er eitt tilfeingi, sum eigur at fáast sum mest burturúr, og tað hevur týdning at gera meiri við at kanna og royna at finna náttúruvinarligar loysnir fyri ta stóru nøgdina av gróti. Ráðgevarafelagið hevur undir hoyringini víst á, at ein møguleiki er at skipa eina hugskotskapping um hvussu grótið Sandoyarmegin best kann gagnnýtast. Meirilutin tekur undir við hesum hugskoti og metir tað hava týdning at gera heldur meira við at kanna, meta um og royna at finna visjonerar og náttúruvinarligar loysnir fyri ta stóru nøgdina av gróti, sum kemur úr tunlinum.

Nevndin hevur viðgjørt spurningin um, hvussu føroyskar fyritøkur og føroysk arbeiðsmegi kann førleikamennast í sambandi við at Suðuroyartunnilin verður gjørdur.

Talan er um størstu verkætlan í Føroya søgu, og tá verkætlanir av hesari stødd verða gjørdar, so heldur meirilutin at tað eigur at verða ein natúrligur partur, at tað tilvitað verður hugsað um at førleikamenna føroyskar fyritøkur og føroyska arbeiðsmegi.

Ráðgevarafelagið hevur undir hoyringunum greitt frá, at føroyskar fyritøkur eru førar fyri at loysa allar ráðgevingaruppgávur í samband við Suðuroyartunnilin. Tað hevur eisini stóran týdning fyri møguleikan at draga útbúnar føroyingar aftur í ráðgevarastørv í Føroyum, at føroyska ráðgevaravinnan sleppur uppí part, tá stórar spennandi verkætlanir, sum Suðuroyartunnilin, verða gjørdar.

Meirilutin er á einum máli um, at førleikamenning av føroyskum fyritøkum og føroyskari arbeiðsmegi skal hugsast inn, tá Suðuroyartunnilin verður bjóðaður út.

<u>Til nr. 2 og 3:</u>
Talan er um lógartekniska fylgibroyting til broyting nr. 1.

<u>Til nr. 4:</u>
Løgmansskrivstovan hevur sent nevndini eina áheitan um at gera ávísar broytingar í lógaruppskotinum. Áheitanin liggur sum nevndarskjal í málinum og snýr seg um at broyta § 8 fyri at tryggja, at frágreiðingin um avleiðingar fyri náttúru og umhvørvi er nøktandi, við at áseta, at Umhvørvisstovan skal góðkenna frágreiðingina umframt annað í hesum sambandi.

Meirilutin tekur undir við hesum og hevur hetta tí við í sínum broytingaruppskoti.

*Ad § 8, stk. 1*
Ásetir, at tað er skyldan hjá P/F Suðuroyartunlinum at gera eina frágreiðing, sum lýsir avleiðingar av samlaðu verkætlanini á náttúru og umhvørvi.

Krav um umhvørvisárinsmeting er ikki ásett í føroyskari lóggávu, men í samráð við Umhvørvismálaráðið og Umhvørvisstovuna, skal frágreiðingin fevna um:

Lýsing av náttúru og umhvørvi á staðnum og tí ávirkan, sum ætlanin kann hava á eitt nú fólk og bústaðarøki (frástøða, spillvatn, óljóð, ristingar v.m.); gróður og djóralív á landi, í vatni, í luftini; jørð, vatn, og luft og veðurlagsskipanina; rekreativ virði, landsløg o.a.

Eisini skal frágreiðingin lýsa, hvørji tiltøk verða sett í verk fyri at avmarka møguliga ávirkan á omanfyrinevndu viðurskifti.

P/F Suðuroyartunnilin hevur skyldu til at gera frágreiðingina og fer í hesum sambandi at fáa fakfólk við serkunnleika til ymisku tættirnar at standa fyri kanningararbeiðinum.

Umhvørvisstovan hevur víst á, at tað er ynskiligt, at P/F Suðuroyartunnilin ger eina arbeiðsskrá í samráð við Umhvørvisstovuna. Arbeiðsskráin skal m.a. vísa, hvussu umhvørvisárinsmetingin verður skipað, og skal lýsa nær og av hvørjum metingin verður gjørd, og hvørjar kanningar fara at verða gjørdar.

Endamálið er at tryggja, at umhvørvisárinsmetingin kemur at fevna um viðkomandi viðurskifti og neyðugar kanningar verða gjørdar.

P/F Suðuroyartunnilin syrgir fyri, at neyðugar kanningar verða gjørdar og ger uppskot til umhvørvisárinsmeting, sum verður latin Umhvørvisstovuni til viðmerkingar.

Umhvørvisárinsmetingin verður síðani send í almenna hoyring, áðrenn endaliga frágreiðingin verður latin Umhvørvisstovuni til góðkenningar.

*Ad § 8, stk. 2*
Ásett er, at Umhvørvisárinsmetingin skal í almenna hoyring hjá almenningi og viðkomandi pørtum. Síðani skal frágreiðingin endaliga góðkennast av Umhvørvisstovuni.

*Ad § 8, stk. 3*
Ásett er, at tey, sum eru partur av málinum, kunnu kæra góðkenningina av frágreiðingini við fýra vikur freist til landsstýrisfólkið við umhvørvismálum.

*Ad § 8, stk. 4*
Ásetingin heimilar Umhvørvisstovuni at taka gjald fyri málsviðgerð í sambandi við góðkenning av umhvørvisárinsmetingini sbrt. § 8 stk. 1 og umhvørvisgóðkenningini í § 8, stk. 5 í lógaruppskotinum.

Tá Umhvørvisstovan letur góðkenning til almennar og privatar stovnar – herundir eisini kommunur sambært umhvørvislógini, verður hetta gjørt mótvegis gjaldi. Talan verður um somu skipan.

*Ad § 8, stk. 5*
Talan er um lógartekniska fylgibroyting til broyting nr. 1.

Ásett verður, at undirsjóvartunnilin skal hava umhvørvisgóðkenning sambært § 26, stk. 1 í Umhvørvisverndarlógini, áðrenn verkætlanin verður framd og verður frágreiðingin, sum er lýst omanfyri, partur av góðkenningartilgongdini.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum. Ein umhvørvisgóðkenning setur treytir til eitt nú óljóð, lukt, ristingar, spillvatn o.a.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

<u>Steffan Klein Poulsen hevur harumframt hesar viðmerkingar:</u>
Undirritaði tekur undir við viðmerkingum minnilutans um fíggingarleist.

**Minnilutin** (Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Minnilutin tekur undir við viðmerkingum meirilutans og broytingaruppskoti hansara, men mælir harumframt til at prosjektera alternativu linjuføringina frá Sandoyartunlinum í Traðardali til tunnilsmunna innanfyri Múlan og undirsjóvartunnil haðani til Sandvíkar.

<u>Fíggingarleistur</u>
Minnilutin er væl vitandi um, at við samtykt av hesum lógaruppskoti, so verður ikki endalig avgerð um at fremja suðuroyartunnilsverkætlanina. Tó eiga vit so avgjørt at fyrireika fíggingina av hesi risastóru verkætlan so væl sum tilber og tað longu nú.

Kostnaðurin fyri verkætlanina verður mettur at liggja um tær fýra milliardir krónurnar, men vit vita hetta ikki nágreiniliga fyrr enn prosjekteringin er liðug, útboð hevur verið og tilboð eru innkomin. Eitt er tó vist og tað er, at hetta snýr seg um eina upphædd upp á nakrar milliardir krónur.

Vit hava skyldu til at fáa eina so trygga, góða og bíliga fígging, sum tilber – tað kann eingin ivast í, at tað er bæði sjálvsagt og rætt. Vit mega eisini út um landoddarnar fyri at fáa neyðuga fígging til verkætlanina og tíðin kemur at vísa, hvussu áhugin er fyri at fíggja ella vera við til at fíggja hesa verkætlan.

Eitt sum javnan hevur verið á lofti er um møguleikan fyri at fáa eitt statslán úr Danmark sum fígging av hesi verkætlan. Higartil, so hevur hesin møguleikin, sum nevndur verður, ikki fingið serliga positiva umrøðu í politisku skipanini – fatan minnilutans er, at sum landið liggur í løtuni, so verður hesin møguleikin frávaldur. Hetta sjónarmið undrar stórliga, tí sum nevnt omanfyri, so eiga vit at fá tað bestu fíggingina, sum hugsast kann – hetta eru jú almennir pengar vit tosa um.

Tá um fígging av verkætlanini við Suðuroyartunnilinum ræður, so ber ikki til í verandi løtu at koma við einum ítøkiligum roknistykki. Orsøkin er, at tað eru so nógvir ymiskir tættir, sum koma í spæl, tá metast skal um lán til verkætlanina. Her kann nevnast m.a. lánsupphædd, renta og áramál fyri láninum. Heldur ikki hava – minnilutanum vitandi – verið nakrar ítøkiligar kanningar gjørdar um eina møguliga fígging av tunlinum.

Sum fyrr nevnt, so verður lánsupphæddin helst nakrar milliardir krónur, og tí kemur rentan at verða sera avgerandi fyri endaliga kostnaðin av hesi stóru verkætlan og í síðsta enda helst avgerandi fyri um verkætlanin verður framd ella ikki. Tí verður sera týdningarmikið at fáa eitt gott og trygt lán við einum so lágum rentusatsi sum gjørligt. Um vit siga, at í staðin fyri at rentan er 4% p.a., at hon er 3 % p.a., so vil rentumunurin lættliga verða nakrar 10-tals milliónir um árið og tí fleiri 100-tals milliónir gjøgnum 30 ár. Hetta eru ikki smávegis upphæddir. Um rentumunurin verður minni enn nevnt omanfyri, so snýr tað seg kortini framvegis um stórar upphæddir.

Vit hava skyldu til at fáa allarbestu fígging, og tí mugu allir møguleikar troytast og eingin útilokast.

Tí slepst ikki undan, at allir hugsandi møguleikar fyri fígging verða kannaðir og har er íroknað eitt møguligt statslán frá Danmark. Alt annað er ábyrgdarleyst.

<u>Linjuføringin</u>
Neyðugt er altíð at taka avgerðir á væl upplýstum grundarlagi, og soleiðis er eisini við hesi stóru tunnilsverkætlan.

Minnilutin metir, at ikki er heilt komið á mál við fyrireikingum og kanningum við hesi verkætlan, tí alternativa linjuføringin frá Sandoyartunlinum í Traðardali til tunnilsmunna innanfyri Múlan og undirsjóvartunnil haðani til Sandvíkar er ikki nóg væl lýst enn.

Av hesi orsøk mælir minnilutin til eisini at gera eitt forprosjekt og prosjektering av alternativu linjuføringini umframt útboð av hesum. Verður hetta gjørt, so hava vit góðar upplýsingar um báðar linjuføringarnar og vera tí betur før fyri at taka avgerð í hesum máli.

Minnilutin er væl vitandi um, at hetta kemur at taka nakað av tíð. Undir hoyringunum er komið fram, at tað at gera forprosjektið verður mett at taka umleið seks mánaðir umframt nakað av tíð

afturat – neyvt hvussu nógva tíð var sera trupult at meta um. Eisini er upplýst, at kostnaðurin fyri at gera eitt forprosjekt og prosjektering av alternativu linjuføringini er umleið 25 mió. kr.

Minnilutin setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"P/F Suðuroyartunnilin fyrireikar, prosjekterar og letur í útboð hesar verkætlanir:
1) Farleið frá Sandoyartunlinum í Traðardali til tunnilsmunna í Djúpadali, norðanfyri Skarvanes, við íbinding í verandi veg til Skarvanesar og íbinding til verandi veg til Skálavíkar,
2) undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norður í sama bergholi frá Djúpadali til Sandvíkar,
3) Farleið frá Sandoyartunlinum í Traðardali til tunnilsmunna innan fyri Múlan,
4) undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norður í sama bergholi innan fyri Múlan til Sandvíkar,
5) atkomutunnil við stýrdari atkomu frá Suðuroyartunlinum til Skúvoyar,
6) vegagerð millum undirsjóvartunnilin í Sandvík og nýggja Sandvíkartunnilin,
7) tunnil úr Sandvík til Hvalbiar, og
8) vegagerð í Hvalba, frá Sandvíkartunlinum til landsvegin frá nýggja Hvalbiartunlinum."

**2.** Í § 5, stk. 1 verður "sum nevndir eru í § 3, stk. 1, nr. 1 og 2 og 5-7" broytt til: "sum nevndir eru í § 3, stk. 1, nr. 1 og 3 og 6-8".

**3.** Í § 6, stk. 1, verður "Suðuroyartunnilin, sbr. § 3, stk. 1, nr. 3 og 4" broytt til: "Suðuroyartunnilin, sbr. § 3, stk. 1, nr. 2 og 4-5".

**5.** § 8 verður orðað soleiðis:
"**§ 8.** P/F Suðuroyartunnilin hevur skyldu til at fáa til vegar eina frágreiðing um avleiðingar fyri náttúru og umhvørvi (umhvørvisárinsmeting) av samlaðu verkætlanini. Áðrenn farið verður undir verkætlanina, skulu úrslit av umhvørvisárinsmetingini vera góðkend av Umhvørvisstovuni.
*Stk. 2.* Viðkomandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir skulu hoyrast, áðrenn umhvørvisárinsmetingin verður góðkend.
*Stk. 3.* Góðkenningin sbrt. § 8, stk. 1 kann kærast til landsstýrisfólkið við umhvørvismálum av teimum, sum eru partur av málinum. Kærufreistin er fýra vikur.
*Stk. 4.* P/F Suðuroyartunnilin skal endurrinda útreiðslur, sum Umhvørvisstovan hevur í sambandi við viðgerð av umhvørvisárinsmeting og umhvørvisgóðkenning, sbrt. § 8, stk. 1 og stk. 3. Gjaldið verður roknað við støði í tímanýtslu og tímakostnaði hjá Umhvørvisstovuni.
*Stk. 5.* Undirsjóvartunnil sbrt. § 3, stk. 1, nr. 2 og 4-5 krevur loyvi sbrt. § 26, stk. 1 í umhvørvisverndarlógini."

**Viðmerkingar til broytingaruppskotið:**
Til nr. 1:
Í lógaruppskotinum er lagt upp til, at samanbinding ímillum Suðuroyartunnilin og Sandoyartunnilin skal gerast við farleið á Traðarhamri við vegi, sum fer upp í umleið 200 metra hædd. Minnilutin mælir eins og meirilutin til, at tað eigur at verða kannað, um tað ikki í tøttum samstarvi við kommunurnar finnist ein betri loysn enn farleiðin eftir Traðarhamri, til dømis við einum tunli gjøgnum Traðarhamar. Hesum verður latið upp fyri við at broyta stk. 1, nr. 1 og 2.

Harumframt mælir minnilutin til eisini at gera eitt forprosjekt og prosjektering av alternativu linjuføringini umframt útboð av hesum.

Til nr. 2 og 3:
Talan er um lógartekniska fylgibroyting til broyting nr. 1.

Til nr. 4:
Løgmansskrivstovan hevur sent nevndini eina áheitan um at gera ávísar broytingar í lógaruppskotinum. Áheitanin liggur sum nevndarskjal í málinum og snýr seg um at broyta § 8 fyri at tryggja, at frágreiðingin um avleiðingar fyri náttúru og umhvørvi er nøktandi, við at áseta, at Umhvørvisstovan skal góðkenna frágreiðingina umframt annað í hesum sambandi.

Minnilutin tekur undir við hesum og hevur hetta tí við í sínum broytingaruppskoti. Víst verður í hesum sambandi til serligu viðmerkingar meirilutans til tað sama.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 28. apríl 2025**

| | | |
|---|---|---|
| Eyðgunn Samuelsen<br>forkvinna | Beinir Johannesen<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Dennis Holm | Hanna Jensen | Magnus Rasmussen |
| | Steffan Klein Poulsen | |